## *Møtirøðin við*

***Daniel Banu** & **Thomas J. Askham***





Fríggjakvøldið 27. okt. og leygarkvøldið 28. okt. kl. 20.00 og sunnukvøldið 29. okt. kl. 18.00 Møti í Missiónshúsinum í Skopun. Sangluttøka við Jónhilda og Gullak, Hedvig og Hallmar og fleiri úr Sandoynni.

Týskvøldið 31. okt. kl. 20.00. Møti í Misssiónshúsinum í Miðvági. Sangbólkurin "Ljósið" syngur.

Fríggjakvøldið 3. nov. kl. 20.00. Húsmøti hjá Eivind Bech í Lopra.

Leygarkvøldið 4. nov. kl. 20.00. Møti í Missiónshúsinum í Vági. Kórið úr Sumba syngur.
Sunnukvøldið 5. nov. kl.18.00. Nimrod og Ebba syngja.

Mikukvøldið 8. nov. kl. 20.00. Møti í Solo Dio Gloria. Thorbjørn Láadal og Steintór Hjaltalin syngja.
Hóskvøldið 9. nov. kl. 20.00. Lokalar Sangkreftir.

Leygarkvøldið 11. nov. kl. 20.00. Møti í Oasuni. Eclesia syngur.
Sunnumorgun 12. nov. kl. 11.00. Møti í Filadelfia í Vágum.
Sunnukvøldið 12. nov. kl. 18.00. Møti í Oasuni. Hedvig, Hjalmar, Thorbjorn og Steintór syngja.

Skráin finst eisini inni á heimasíðu okkara: www.123hjemmeside.dk/jofri

Við møtini verða upptikin offur til Rumenien.

Orðt.11.v/25 Vælgerin sál skal verða ríkliga mettað, og tann, ið øðrum lívgar, skal sjálvur verða lívgaður.

Hjartaliga vælkomin til hesi møtini.

Heb.13.v/8 Jesus Kristus er í gjár og í dag hin sami og um allar ævir.

***Leiðslan fyri fundarrøðina***

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# Dugir tú at undirvísa?

### Á EL-DEILDINI
### er eitt starv sum undirvísari leyst !

Av tí at ein av okkara royndu lærarum fer úr starvi, sóknast vit eftir einum dugnaligum undirvísara, sum, saman við hinum lærarunum á deildini, kann geva eina fyrsta floks frálæru til okkara næmingar.

**Vit vænta:**
- at tú hevur sveinabræv sum elektrikari.
- at tú hevur nomið tær víðari útbúgving sum el-installatørur ella verkfrøðingur innan økið.
- at tú hevur hollan og dagførdan kunnleika til PLC og IHC.
- at tú fylgir væl við í nýggjastu tøknini innan økið.
- at tú hevur viðkomandi starvsroyndir.
- at tú dugir nakað av støddfrøði og alisfrøði.
- at tú hevur teldukunnleika.
- at tú dugir væl at arbeiða við ungfólki.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi og avbjóðandi starv saman við royndum starvsfeløgum.
- møguleika fyri dagføring og eftirútbúgving innan økið.
- løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

**Tú:**
- kanst venda tær til Jógvan Sørin Hansen, leiðandi lærara, á el-deildini tlf. 510136, um tú vilt vita meiri um starvið.
- skal senda okkum tína umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir áðrenn 6. nov. 2006 til Tekniska Skúlan í Tórshavn, Postboks 3239, 110 Tórshavn.

Starvið skal setast 1. januar 2007. Fyrstu 2 árini er royndartíð, har tú, sum settur verður í starv, má vera til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg námsfrøðiliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur í fast starv.

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

*El-deildin á Tekniska Skúlanun í Tórshavn tekur sær av undirvísing av el-lærlingum og SIT-næmingum.*
*Eisini undirvísa lærararnir á eftirútbúgvingarskeiðum og teimum víðari útbúgvingum, sum skúlin hevur.*
*Á deildini starvast 7 lærarar og ein verkvørður.*

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo